## Viðmerking:

# Fáa vit eitt betri koyrikort í framtíðini?

Hesin spurningur kann verða reistur millum aðrar, nú Føroya Løgting tann 4. mai 2000 endaliga samtykti ferðslulógarbroytingina við gildi frá 1. juli 2000.

Nakrar av lógarbroytingunum høvdu samband við koyrikortið, m.a.:

• Nýggjar ásetingar um heilsulig krøv fyri útvegan og endurnýggjan av koyrikortum,

• Koyring við lítlari motorsúkklu (ferð max. 45 km/t og slagvolumen max. 50 cm3) við vanligum koyrikorti til persónbil,

• Eftiransandi koyriroynd í samband við treytaða og treytaleysa frádøming av koyrirættindunum.

Nú lógarbroytingin endaliga er samtykt, fer Bileftirlitið saman við Vinnumálastýrinum, undir arbeiði at gera eina nýggja kunngerð um koyrikort, sum m.a. inniheldur ásetingar um omanfyrinevndu lógarbroytingar og m.a. ætlandi harumframt nýggjar ásetingar um:

• Nýggja frálæruætlan

• Minstu krøv til tímatal fyri koyrifrálæruna Royndarkoyrikort

• Verandi kunngerð er frá 1966 við einum uppískoyti frá 1968 og er seinastu ferð broytt í 1992, og má tí metast at vera ótíðarhóskandi og ikki í tráð við altjóða reglur um eitt tíðarhóskandi koyrikort.

### Heilsulig krøv

Meginreglan í lógini er, at koyrikort kann verða latið persóni, ið hevur nóg góð eygu og oyru og annars neyðugan andligan og likamligan førleika.

Ætlandi verða heilsuligu krøvini herd fyri koyrikort til stóran bil og koyrikort til vinnuligan fólkaflutning, soleiðis at tey svara til krøvini í grannalondum okkara.

Meginreglan er, at koyrikort til vanligan persónbil verður útgivið við gildi til viðkomandi fyllir 70 ár, um ongi heilsulig krøv forða hesum. Ætlanin er, at koyrikort til lastbil, buss og viðfestivogn verða útgivin við gildi til viðkomandi fyllir 50 ár og hereftir verður endurnýggja fimta hvørt ár, har læknalig støða verður tikin til heilsuliga førleikan í hvørjum einstøkum føri.

Koyrikort til vinnuligan fólkaflutning skal undir øllum umstøðum endurnýggjast fimta hvørt ár, har læknalig støða eisini verður tikin til heilsuliga førleikan í hvørjum einstøkum føri.

Ætlandi verða reglurnar um sjón herdar. Um persónur er blindur í øðrum eyganum ella sær dupult, kann koyrikort ikki verða útgivið ella endurnýggja til lastbil, buss, viðfestivogn ella vinnuligan fólkaflutning. Sama ger seg galdandi, um persónur hevur ella hevur havt epilepsi. Tá talan er um persónar við hjartasjúkum, verður læknalig meting gjørd í hvørjum einstøkum føri.

### Lítil motorsúkkla

Lítlar motorsúkklur, sum hava motor við eini slagvolumen, sum er minni enn 50 cm3, men kunnu koyra 45 km/t og eru skrásettar sum motorsúkklur, hava higartil bert kunna verið koyrdar av persónum, sum hava koyrikort til motorsúkklu. Hesar súkklur eru væl dámdar og eru komnar til landið í stórum tali seinnu árini.

Broytingin í ferðslulógini førir við sær, at lítlar motorsúkklur aftaná 1. juli 2000 kunnu koyrast av persónum, sum hava fingið koyrikort til bil ella motorsúkklu. Í grundgevingini til lógaruppskotið varð mett at lítlar motorsúkklur kundu førast av persónum, ið høvdu koyrikort til bil og at tað ikki var neyðugt, at seta somu krøv við koyring við lítlari motorsúkklu viðvíkjandi koyridugnaskapi, sum sett vórðu við koyring við teimum stóru og sera skjóttkoyrandi motorsúkklunum.

### Eftiransandi koyriroynd

Tað sum áður æt leiðbeinandi koyriroynd, eitur nú eftiransandi koyriroynd. Ein eftiransandi koyriroynd er sett saman av eini ástøðiligari og eini verkligari roynd. Ein eftiransandi roynd verður hildin sum eitt eftirlit av koyridugnaskapinum hjá føraranum í sambandi við eina frádøming av førararættinum og ætlanin er, at førarin av røttum kennir ta eftiransandi royndina sum eitt eftirlitstiltak.

Broytingin í lógini fyriskrivar eftiransandi koyriroynd fyri treytaleysa og treytaða frádøming í hesum førum:

**1. Treytaleys frádøming.**
a) Rúsdrekka- & promillukoyring Tá frádømutíðin er umliðin, kann viðkomandi vinna aftur koyrirættindini aftaná nýggja koyrifrálæru og tá eftiransandi koyriroynd er staðin.

b) Onnur ferðslulógarbrot Tá frádømutíðin er umliðin, kann viðkomandi vinna aftur koyrirættindini, tá eftiransandi roynd er staðin.

**2. Treytað frádøming vegna:**
a) promillukoyring
b) ov nógva ferð
c) koyrimistak o.l.

Innan eina freist, sum verður ásett av Bileftirlitinum, skal viðkomandi til eina eftiransandi koyriroynd. Stendur viðkomandi ikki royndina ella letur vera við at fara til royndina, verður koyrirætturin tikin.

Higartil hevur ikki verið neyðugt við nýggjari koyrifrálæru til eftiransandi roynd, um royndin varð staðin innanfyri 3 ár aftaná frádøming. Sambært nýggju reglunum, skal viðkomandi hava fingið nýggja koyrifrálæru, um hann er frádømdur koyrirættindini treytaleyst vegna rúsdrekka- ella promillukoyring.

### Nýggj frálæruætlan

Verandi frálæruætlan er frá 1989 og treingir til ábøtur, av tí at hon ikki longur er tíðarhóskandi og menningin á økinum fer fram allatíðina.

Í staðin fyri sjálvir at uppfinna tann djúpa tallerkin eina ferð afturat, vil Bileftirlitið skjóta upp yvirfyri Vinnumálastýrinum, at seta í gildi donsku frálæruætlanirnar fyri teir ymsu koyrikortsbólkarnar. Hesar frálæruætlanir eru frá 1995, men verða leypandi dagførdar við menningina á økinum. Føroysk og donsk ferðslulóggáva líkjast ættiliga nógv, og tí kunnu frálæruætlanirnar við smávegis broytingum, setast í gildi í Føroyum.

Frálæruætlanirnar skilmarka greitt,

• hvørjum evnum koyrilærarin skal undirvísa næmingunum í

• hvat næmingurin í smálutum skal kunna til eina ástøðis- og verkliga koyriroynd og

• hvussu próvdómarin skal døma koyriroyndina og hvat næmingurin kann hoyrast um.

### Minsta tímatal fyri koyrifrálæru

Tað hevur leingi verið ein umrøða av, hvørvítt tað skuldi setast í verk eitt minsta tímatal fyri koyrifrálæru. Bileftirlitið hevur nýliga sett eitt krav um minsta tímatal fyri koyrifrálæru til vanligan persónbil. Hetta er eisini í tráð við rákið uttan um okkum og seinast hava donsku myndugleikarnir í fjørvár sett fram krav um minsta tímatal fyri koyrifrálæru fyri allar koyrikortsbólkar.

Vit halda hetta vera eitt gott tiltak fyri at fáa frálæruna uppá eitt so einsháttað støði sum møguligt og vilja í eini nýggjari koyrikortskunngerð arbeiða fyri, at seta fram krav um minsta tímatal.



*Jákup Jacobsen, stjóri á Bileftirlitinum*

### Royndarkoyrikort

Rættarnevndin hjá løgtinginum reisti spurningin um royndarkoyrikort, tá nevndin til endurskoðan av ferðslulógini var á fundi við Rættarnevndina.

Galdandi ferðslulóggáva § 18b, stk. 2, heimilar landsstýrinum at gera av, at koyrikort til bil ella motorsúkklu, fyrstu ferð, tað verður tikið, verður útgivið við 2 ára gildistíð, og at eigarin, áðrenn gildistíðin er farin, skal fáa eykalæru og taka nýggja roynd í serstøkum aksturførleika sum treyt fyri, at koyrikort við gildistíð sum ásett í stk. 1, 1. pkt., (til 70 ára aldur) kann verða latið.

Fleiri onnur, sum hava áhugað fyri ferðslutrygd, hava tikið undir við hugsanini um eitt royndarkoyrikort og sambært heimasíðuni hjá Løgtinginum, fekk Rættarnevndin áheitan frá lærarunum í Mikladali, sum hevur búð nøkur ár í Luxembourg, um at virka fyri einum 2-ára royndarkoyrikorti, á sama hátt sum gjørt var t.d. í Luxembourg. Mær vitandi hava íslendingar somuleiðis hesa skipan og norðmenn geva eitt 2-ára royndarkoyrikort til tey, sum ikki enn hava staðið myrkakoyring.

Spurningarnir, sum eg meti hava týdning í hesum sambandi eru:

• skal nakað aldursmark vera fyri at geva eitt royndarkoyrikort, t.d. 25 ella 30 ára aldur,

• hvørji metingarstøði skulu liggja til grund fyri eykafrálæru og nýggjari koyriroynd, t.d. — eitt av teimum brotum, sum sambært broyttu ferðslulógini, høvdu ført við sær treytaða frádøming av koyrirættindunum (promillukoyring, ferð og koyrimistak).

Tey sum enn ikki hava tikið skeið í myrkakoyring, tá koyrikort fyrstu ferð verður útgivið, skulu harumframt mótvegis Bileftirlitinum skjalprógva skeið í myrkakoyring, áðrenn koyrikort verður útskrivað til 70 ára aldur.

### Samanumtøka

Eg byrjaði við spurninginum, um vit í framtíðini fáa eitt betri koyrikort?

Tey teknisku tiltøk, sum ætlanin er fremja í nýggju koyrikortskunngerðini, eru eitt gott stig á vegnum, men tað er ongin ivi um, at skal 0-hugsjónin hava ein møguleika fyri at eydnast, so sleppast kann undan meiningsleysu vanlukkunum í ferðsluni, so mugu vit øll, sum á ein ella annan hátt eru partar av tilgongdini, taka í egnan barm og tora at rannsaka okkum sjálvi, um vit kunnu gera okkara arbeiði øðrvísi og betur, fyri at røkka málsetninginum.

Fyrrenn unga fólkið hevur fingið ein sunnan hugburð um ferðslutrygd og um hvussu ein eigur at bera seg at í ferðsluni og úrslitið er 0 deyður í ferðsluni, er málið ikki rokkið.

**Tórshavn, hin 27. mai 2000**
**Jákup Jacobsen, stjóri**
**Bileftirlit Føroya**



# Fimm ættarlið

*84 ára »gamla« Kathrina Jacobsen á Skipanesi er olduromma eitt ára gomlu Mariu Lamhauge Hansen*

Kathrina Jacobsen á Skipanesi má sigast at hava stjóra familju. Hóast »bert« 84 ára gomul eigur hon eina oldurommudóttur, sum er eitt ár. Sonur hennara, Meinhard Jacobsen, sum er 65 ára gamal er langabbi, dóttur hansra, Klara Hansen, sum er 43 ár er omma, og sonur hennara, Kári Hansen, sum er 24 ár, er pápi eitt ára gomlu Mariu Lamhauge Hansen.

*Frá vinstru Kári Hansen, 24 ár, pápi, Maria Lamhauge Hansen, 1 ár, dóttir, Klara Hansen 43 ár, omma, Petur Meinhard Jacobsen, 65 ár, langabbi, Kathrina Jacobsen, 84 ár, olduromma*



## Í býin - altíð eitt stað at fara


Streymoy



KONSERT Á MARGARINFABRIKKINI
fríggjakvøldið 9/6 spæla
ÐIÐ
og
E-POT
á Margarinfabrikkini
Konsertin byrjar kl. 22.00 og endar kl. 02.00.
Aldursmark 13 ár.
Kostnaður kr. 20,- fyri limir og kr. 30,- fyri ikki limir
Sosialurin - 311820

Kaggin
Fríggja- og leygarkvøldið spæla
TAXI
1. hvítsunnudag 11/6 er stongt
Kaggin
Kaggin
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

Manhattan PUB & CAFÉ
EM 2000
Í samband við EM 2000 vísir Manhattan allar dystirnar beinleiðis...
10/6 kl. 19.45 Belgia - Svøríki
11/6 kl. 13.30 Turkaland-Italia
11/6 kl. 17.00 Frakland-Danmark
11/6 kl. 19.45 Holland-Kekkia
12/6 kl. 17.00 Týskland-Rumenia
12/6 kl. 19.45 Portugal-Ongland
13/6 kl. 17.00 Spania-Norra
13/6 kl. 19.45 Jugoslavia-Slovenia
14/6 kl. 17.30 Italia-Belgia
15/6 kl. 17.30 Svøríki-Turkaland
NÝTT • NÝTT
Nú opið hvønn gerandisdag frá 12-24 við fjølbroyttari matarskrá
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel. 31 96 96

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.- Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Vágoy

Dagsins rættur
8/6 til 13/6
Hósdagin.......08. Lamba "steak"
Borðreiddur við grønmeti, eplum "Maison" og mildari sinnoppssós
Fríggjadagin..09. Enskur búffur
Borðreiddar við bleytum leyki, hvítum eplum og soðsós
Leygardagin..10. Toskakarbonada
Borðreiddar við hvítum eplum, grønmeti og smørsós við frísk rivnari piparrót.
Sunnudagin...11. Fjallavatnssuppa
við hvítum drýli
Kalkunrullusteik
fylt við champignon og persillu. Borðreiddur við smørstoktum eplum, sukurertrum og sitrónsós
Rabarbukøka
við makrónum og róma
Mánadagin....12. Rækjubland
við Marry Rose dressing og flütes
Heilstoktur oksaháryggur "Bordelaise"
Borðreiddur við rómaeplum og grønmeti
Desserttallerkur
við heimagjørdum ísi, køku, frískari frukt við fruktmorli
Týsdagin........13. Fylt svínakotelet við leyki og eplum
Borðreiddur við grønmeti, rísi og paprikasós.
• Dagsins rættur: kr. 65,-
• 3 rættir v/kaffi: kr. 145,-
Billard
Solarium
• Vit lata eisini út av húsinum •

Hotel Vágar
Tel. 33 29 55

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Matseðil
Hósdagin 8. juni:
Revelsbein
Fríggjadagin 9. juni:
Wienersnitzel
Leygardagin 10. juni:
Oksasteik
Mánadagin 12. juni:
Stongt
Týsdagin 13. juni:
Hamburgararyggur
Mikudagin 14. juni:
Bankikjøt
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Upp- og afturlatingartíðir um hvítsunnuna:
Fríggjadagin 9/6 kl. 17.00-20.00
Hvítsunnuaftan 10/6 kl. 20.00-23.00
Hvítsunnudag 11/6 er STONGT
2 Hvítsunnudag 12/6 kl. 17.00-22.00
GLEÐILIGA HVÍTSUNNU
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

Vilja tygum vi› í b‡in - hvønn hósdag